## 10 milliónir til floksarbeiði

Síðani síðsta landsfund hevur Javnaðarflokkurin selt Sosialin. Men hesum væntar Jóannes Eidesgaard sær als ongar trupulleikar av á landsfundinum.

- Tað er ikki rætt, at ein politiskur flokkur skal eiga eitt blað, tað eru vit samd um. Vit hava nú 10 mió kr, sum vit skulu brúka til politiska arbeiðið hjá flokkinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Enn standa hesir pengar á bók, tí flokkurin hevur gjørt av, at einki oyra skal brúkast, fyrr enn ein greið reglugerð er gjørd um, hvussu pengarnir skulu kunna nýtast.



## All That Rain spælir til fótbóltsdans

Tað er við árunum vorðið siðvenja, at fótbóltskappingin endar við fótbóltsdansi í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og í ár er einki undantak. Ætlanin við dansinum er at geva fótbóltsáhugaðum føroyingum ein karm at savnast eina síðstu ferð, tá kappingarárið er komið at enda.

Tað er All That Rain, ið fer at standa fyri undirhaldinum, og teir borga vanliga fyri góðum framførslum. All That Rain sangarin Rókur Jákupsson Jakobsen var ein av stóru profilunum í fótbóltskappingini fyri tónleikarar, ið var hildin á Ovastevnu í ár. Rókur gjørdi ikki mætari enn at gera eitt hattrick í hvørjum hálvleiki, so hetta tykist, at vera heilt rætti maður at syngja fyri til fótbóltsdans.

Rókur er eisini tiltikin fótbóltssangari, hann og vinmaðurin Hallur byrjaðu tíðliga, tá teir 14 ára gamlir spældu lagið Charlie inn á B36 fløguna. Lagið var eitt risa hitt, og var við til at gera fløguna sera vælumtókta millum føroyska ungdómin. Seinni hevur Rókur eisini sungið á nýggjastu HB fløguni, har hann m.a. sang slagaran HB Fan.

# Vinnufyritøkur skulu einskiljast

**- Tað almenna skal ikki reka vinnufyritøkur, sum kappast við privatar vinnufyritøkur. Nakað annað er tá vit tosa um vælferðarfunktiónirnar, har gongur markið hjá Javnaðarflokkinum fyri einkiljingum, sigur Jóannes Eidesgaard**

LANDSFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Tað er sjálvandi stórur munur á sum løgmaður at greiða framda politikkinum hjá landsstýrinum og so sum andstøðuleiðari at finnast at tí, sum landsstýrið ikki hevur gjørt, sigur Jóannes Eidesgaard, sum á landsfundi hjá Javnaðarflokkinum í Miðvági um vikuskiftið skal greiða floksumboðunum frá rikna politikki floksins á landsfundinum, sum í veruleikanum er sum ein aðalfundur, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður og formaður Javnaðarfloksins.

Sjálvandi verður roknað við bæði rósi og rísi, heldur løgmaður, sum ikki ivast í, at onkur fer at finnast at eisini.

Hóast nógvar kritiskar røddir hava verið frammi mótvegis løgmanni og floksins leikluti í samgongu við tveimum borgarligum flokkum, so heldur Jóannes Eidesgaard kortini ikki, at tað er meirilutin av fólkinum, sum myndar almenna kjakið.

- Eg fari sjálvandi at brúka tíð upp á at greiða frá mínum leikluti og serliga teimum málum, sum eg fáist við. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, fer sjálvandi at greiða frá málunum á hansara øki. Tað krevur sjálvandi eisini eina frágreiðing, hvussu vit fáa okkara mál ígjøgnum í eini samgonu við tveimum borgarligum flokkum – og ikki minst vænti eg, at fólk vilja hava eina frágreiðing upp á skattalættan.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at tað er sera trupult at fara í holt við skattaskipanina, tí tað rakar altíð so ójavnt.

- Vit hava ein toppskatt á inntøkur upp á 300.000 kr, men tað eru so nógv, t. d. handverkarar o. o. sum skjótt koma upp á hesa upphæddina. Trupulleikin er eisini tann, at um vit veita lágu inntøkunum ein skattalætta við verandi skattaskipan, so fáa tær størri inntøkurnar ein uppaftur størri lætta. Tí mugu vit gera eina heilt nýggja skattaskipan, til tess at veita lægru inntøkunum skattalætta.

Formaður Javnaðarfloksins vænta eisini, at fólk fara at krevja frágreiðing upp á einskiljingarnar - tí at tað ikki skal vera í tráð við góðan javnaðarpolitikk.

- Men tær einskiljingar, sum vit hava sett út í kortið eru so avgjørt í tráð við góðan javnaðarpolitikk. Vanligar vinnufyritøkur, sum kappast við aðrar privatar vinnufyritøkur, eiga at verða einskildar, so sum Føroya Tele, Atlantsflog og Føroya Banki, heldur Jóannes Eidesgaard.

- Nakað heilt annað er tað, tá vit koma til vælferðarfunktiónir, har vit hava við røkt av fólki o. l. at gera. Har gongur markið hjá okkum, slíkar fyritøkur verða ikki einskildar, sigur hann.

- Um vit bakka aftur í tíðina – t. d. aftur í seksti, og sjeytiárini, so hevði tað ikki komið upp á tal hjá Javnaðarflokkinum at privatisera nakað sum helst – og so slett ikki Telefonverk Føroya Løgtings, sum tað tá æt. Um vit fara nøkur á fram í tíðina, kunnu vit so ikki roknað við, at Javnaðarflokkurin tá bæði fer at einskilja heilsutønastur, heim-arøkt o. s. fr.?

- Nei, tað fara vit ikki at gera. Tað er júst har, markið gongur, og vit vita, at tey í øðrum londum hava brent seg av hasum. Tað er júst har, at vit seta markið, sigur Jóannes Eidesgaard avgjørdur.

Jóannes Eidesgaard vísir eisini á, at fara vit aftur í tíðina, so var tað eingin – heldur ikki borgarligu flokkarnir í Føroyum, sum tosaðu um slíkar einskiljingar, sum verða framdar í dag.

- Størsta málið hjá Fólkaflokkinum á hesum øki var at einskilja nakrar reyðar lastbilar hjá Stranferðsluni – og hetta júkaði flokkurin um í eini 20 ár, sigur hann.

Jóannes Eidesgaard leggur dent á, at tað er ikki rímuligt, at landið bindur so nógvan kapital í vinnufeløgunum – hann eigur at koma fólkini til góðar, heldur hann.



*- Tær einskiljingar, sum vit hava sett út í kortið eru so avgjørt í tráð við góðan javnaðarpolitikk, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

# Danskur PISA-serfrøðingur á landsfundin



*- Tað nyttar lítið, at vit í Danmark hava heimsins glaðastu skúlabørn, um tey ikki duga nakað, sigur Jan Andreasen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**PISA-kanningin verður á breddanum, tá Jan Andreasen úr Socialdemokratiinum í Keypmannahavn verður gestarøðari á landsfundinum í morgin**

LANDSFUNDUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Landsfundurin hjá Javnaðarflokkinum byrjar í kvøld og heldur áfram leygardagin. Í tí sambandi hevur Javnaðarflokkurin boðið Jan Andreasen úr Socialdemokratiet til Føroya.

Jan Andreasen situr í býráðnum í Keypmannahavn og er skoleordfører, ella tað sum onkur vildi rópt framsøgumaður í skúlamálum, hjá Socialdemokratunum. Hann hevur havt nógv við skúlapolitisk mál at gera, serliga PISA-kanningina, og tí fer røða hansara í ein ógvuliga stóran mun at snúgva seg um hetta, tá hann verður gestarøðari á landsfundinum leygardagin.

Fyri tíggju árum síðani kom fyrsta PISA-kanningin niðri, og úrslitið var skelkandi.

– Vit gingu runt og hildu vit høvdu heimsins besta skúla, men funnu tá út av, at næmingarnir í skúlunum als ikki dugdu nóg væl at lesa og skriva bæði danskt og enskt, og eisini í rokning stóð ikki væl til, fortelur Jan Andreasen og vísir harvið á, at trupulleikarnir í Føroyum minna um teir í Danmark.

Hann heldur, at tað er ógvuliga umráðandi, at føroysku politikararnir ikki leypa framav, nú úrslitini eru so vánalig í kanning okkara.

– PISA-kanningin skal takast í størsta álvara, men tað er ógvuliga umráðandi ikki at leypa framav. Broytingar skulu sjálvandi gerast, men ikki í óðum verki. Her er ikki pláss fyri hovsaloysnum, og tí mugu tit geva tykkum stundir soleiðis, at tað verður funnið fram til eina breiða politiska semju um málið, heldur Jan Andreasen.

Í sambandi við at uppskotið frá PISA-arbeiðsbólkinum varð handað í gjár, varð Jógvan á Lakjuni spurdur, um hann ikki var bangin fyri at PISA-uppskotið fór at detta burtur úr millum, nú valið ikki stendur so langt fyri framman. Tá segði landsstýrismaðurin, at tað var hann á ongan hátt bangin fyri hesum, tí hetta er eitt mál vit øll vara av, sigur hann, og hesum er Jan Andreasen samdur við.

– Vit hava øll gingið í skúla og hava eina meining um hann. Øll eru eisini samd um, at í skúlanum skulu vit læra okkurt. Tí nyttar lítið, at vit í Danmark hava heimsins glaðastu skúlabørn, um tey ikki duga nakað, sigur Jan Andreasen og vísir á, at nú tíggju ár eftir fyrstu PISA-kanningina niðri, so koyrir kjakið framvegis um, hvussu tey í Danmark fáa ein betri fólkaskúla.

**Frá Javnaðarflokkinum**

Mint verður á landsfundin, ið verður í bygdahúsinum í Miðvági. Fundurin byrjar fríggjakvøldið kl. 19.30 og heldur fram leygarmorgunin kl. 9.00.

***Skrá fyri fundin:***

**Fríggjadagin 20. okt. 2006**

kl. 19.30 Fundurin verður settur
Skrivarafrágreiðing
Frágreiðing frá limafeløgunum
Tónleikur

**Leygardagin 21. okt. 2006**

kl. 9.00 Morgunmatur
kl. 9.30 Formansfrágreiðing
Kjak um formansfrágreiðingina
kl. 13.30 Gestarøðari
Tema orðaskifti
kl. 17.30 Matlig hugnaløta

***Møti fjølment***

**Javnaðarflokkurin**